VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF TRADE AND INDUSTRY

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 24. august 2026
Mál.: 26/19691
Viðgjørt AE
Tygara skriv: 52-008/2026

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-008/2026 frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í vinnumálum, Jacob Vestergaard, um asfaltering og liðugtgerð

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjir vegir verða umvældir og asfalteraðir av nýggjum í ár?
2. Hvussu er metingin gjørd av hvørjir vegir skulu raðfestast við játtanini, sum er?
3. Hvørji atlit verða nýtt í metingini?
4. Hvønn leiklut hevur landsstýrisfólk í raðfestingini?
5. Hvør er metti kostnaðurin av at gera landsvegin millum Klaksvík og Norðoyri?
6. Hvør er metti kostnaðurin av at gera vegin lidnan millum tunnilsmunnan og bygdina í Kunoy, og er hetta nakað, sum ætlanin er at fremja komandi árini?
7. Verður ein dagføring av vegnum til Fámjins raðfest hægri enn at til dømis at gera byrgingina um Haraldssund lidna?

Svar til spurning 1
Í ár hevur Landsverk asfalterað vegin millum Norðasta Horn og Velbastað, vegin gjøgnum Velbastað og ein part av vegnum gjøgnum Sands bygd. Talan er um tilsamans 5,5 km av vegi. Ætlanin er eisini at asfaltera eitt vegastrekki á Hellunum. Tilboðini eru komin inn.

Svar til spurning 2 og 3
Landsvegakervið er 480 km. Í miðal eiga vegirnir at verða asfalteraðir umleið fimtanda hvørt ár. Tað merkir, at landið átti at asfalterað umleið 30 kilometrar hvørt ár fyri at halda vegakervið í góðum standi.

Síðan 2023 hevur asfaltering tó verið raðfest við egnari játtan á fíggjarlógini. Samanlagt eru 46 mió. kr. játtaðar í tíðarskeiðinum 2023 – 2026, og 26 km. eru asfalteraðir. Harumframt eru einstøk ár serstakar játtanir til asfaltering, eitt nú 4 mió. kr. til Elduvíkarvegin í 2025, har 4,5 km. vórðu asfalteraðir, umframt at vegir verða asfalteraðir við nýgerð.

Í miðal kostar tað 2 mió. kr. at asfaltera 1 km. av vegi, og játtanin upp á 12 mió. kr. røkkur sostatt bert til einar 6 km. um árið. Neyðugt verður at hækka játtanina til asfaltering næstu árini.

Landsverk metir javnan um støðuna á landsvegakervinum. Metingin verður gjørd av fakfólki, sum eftirkanna øll vegastrekki og gera sínar niðurstøður. Í seinastuni hevur Landsverk eisini brúkt vitlíki í sínum arbeiði. Myndir verða tiknar av vegum kring landið, og vitlíki greinar, hvørji vegastrekki

eru í vánaligum standi. Hetta er ein góður máti at fáa eitt yvirlit yvir alt vegakervið, og er eitt íkast í arbeiðinum hjá Landsverki.

Landsverk raðfestir játtanina til asfaltering eftir í hvørjum standi vegirnir eru, nær asfalterað varð seinast, og hvussu nógv ferðsla er á vegunum. Er nógv ferðsla á einum vegi, sum er illa farin, verður hann skjótari niðurbrotin. Tað verður eisini mett um, hvørt tað loysir seg betri at asfaltera eitt langt vegastrekki, heldur enn fleiri styttri strekki.

Svar til spurning 4
Landsstýrismaðurin tekur ikki lut í raðfestingini av, hvørjir vegir skulu umvælast og asfalterast.

Svar til spurning 5
Norðoyrarvegurin er 2,2 km. Tað kann verða neyðugt at dagføra gongubreytirnar, samstundis sum vegurin verður asfalteraður. Tað verður mett til at kosta 3 mió. kr. at asfaltera vegin til Norðoyrar, um gongubreytirnar eisini verða dagførdar. Sí eisini svar til fyrispurning nr. 52-104/2025 um asfaltering av Oyrarvegnum.

Svar til spurning 6
Vegurin millum tunnilin og bygdina í Kunoy er liðugur. Áðrenn vegurin kann asfalterast, verður neyðugt at avrætta hann nakað, umframt at onnur arbeiði mugu gerast samstundis, har m.a. eitt rulluportur skal skiftast. Mett verður, at tað kostar millum 4 og 5 mió. kr. at asfaltera vegin.

Svar til spurning 7
Tá ein verkætlan verður gjørd, er sera umráðandi, at hon verður gjørd liðug. Tað er bæði bíligari og betri.

Nú Fámjinstunnilin er komin, eigur allur vegurin til Fámjins at verða dagførdur. Tað ber til at brúka grótið úr Fámjinstunlinum til at breiðka seinasta strekkið av vegnum. Landsstýrismaðurin vónar, at undirtøka verður fyri at játta pening til endamálið.

Ferðsluviðurskiftini um Haraldssund skulu eisini vera í lagi. Íløgukarmurin er avmarkaður, men vónandi ber til at raðfesta byrgingina um Haraldssund í langtíðarløguætlanini. Sí eisini svar til fyrispurning nr. 52-112/2025 um vegasambandið um Haraldssund.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður